Álit

í

løgtingsmáli nr. 51/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS- lógin) (Norðurlendski sáttmálin um almannatrygd, hækking av arbeiðsloysisstuðli, eftirlønargjald o.a.)

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevur lagt málið fram tann 4. november 2020, og eftir 1. viðgerð tann 13. november 2020 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 24. november og 1. desember 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Fakfelagssamstarvið, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Arbeiðsloysisskipanina og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum.

Lógaruppskotið snýr seg um at fáa ALS-lógina í samsvar við norðurlendska sáttmálan um almannatrygd, at hækka arbeiðsloysisstuðulin og at dagføra ALS-lógina í mun til broytingar í eftirlønarlógini.

Vinnunevndin tekur undir við at hækka ALS-útgjaldið soleiðis, at hægsta mánaðarliga útgjaldið verður í 18.500 kr.
Sum er fáa arbeiðsleys í ALS í mesta lagi 17.500 krónur um mánaðin, svarandi til 32 tímar um vikuna og roknað út frá miðal inntøku seinastu 12 mánaðirnar. Eru frídagar og halgidagar, so verða hesi trekt 8 tímar hvønn dag, eins og frítíðarløn verður mótroknað. Teirra útgjald er sostatt munandi skert ávís tíðarskeið, eitt nú um páskirnar.

Grundleggjandi má tryggjast, at til ber at liva av arbeiðsloysisstuðlinum, samstundis sum eggjast skal fólki til at fara aftur í arbeiði.

Fleiri fakfeløg mæla til, at útgjaldið hækkar til 20.000 kr. um mánaðin. Nevndin tekur til eftirtektar, at stýrið fyri ALS hevur mælt til ásettu upphæddina, og heitir á partarnar á arbeiðsmarknaðinum um í felag at finna semju, skal útgjaldið broytast.

Nevndin hevur viðgjørt spurningin um reglurnar fyri fiskimenn, sum eru uttan arbeiði, men ikki uppsagdir, í sambandi við, at skip eru á beding. Nevndin hevur heitt á landsstýrismannin um at tryggja, at hesar reglur verða eftirmettar og neyðugar tillagingar gjørdar.

Nevndin vísir á tað heilt serliga við ALS-lógini, har tað beinleiðis er lógarásett, at stýrið skal góðkenna reglur, sum landsstýrismaðurin ásetir um útgjøld. Hetta ger, at broytingar í lógini vanliga ikki verða gjørdar uttan við góðkenning frá stýrinum í ALS, sum umboðar partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Nevndin hevur undir viðgerðini fingið upplýst, at stýrið er farið undir at eftirmeta ALS-skipanina, og hevur nevndin heitt á landsstýrismannin um at tryggja, at spurningurin um reglurnar fyri fiskimenn, umframt mótrókningarreglur í sambandi við halgidagar og annað verður partur av eftirmetingini.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Vinnunevndin, 1. Desember 2020

Bjørt Samuelsen formaður	Johan Dahl næstformaður	Bjarni Hammer
Henrik Old	Bjarni Kárason Petersen	Beinir Johannesen
	Jákup Mikkelsen	